# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 5/2024**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: 07 Vestur kærir HB fyri brúk av ólógligum leikarum, sum eru skrásettur í øðrum feløgum, 3. deild menn** | |
| Deild: 3. deild menn | Hvør hevur reist málið: 07 Vestur |
| Kapping: Landskapping | Aga- og etiskanevndin móttikið kæru: 8. juli |
| Møguligt brot framt: 29. juni 2024 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

## Úrskurður

Staðfest er, at HB hevur brúkt í minsta lagi tveir ólógligar leikarar í dysti móti 07 Vestur, leiktur 29. juni. Talan er um brot á grein 15 í Kappingarreglugerðini, sum ásetur at leikari annaðhvørt skal vera skrásettur ella hava loyvisbræv fyri lógliga at leika fyri felagið.

Avleiðingin av at brúka leikarar, sum eru skrásettir ella hava loyvisbræv í øðrum feløgum er, at HB verður dømt at tapa dystin við málmuninum 0-3 sambært § 6, bókstav g í 3. reglubroti í aga- og etisku reglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

At HB ikki lat dómaraseðil inn við leikaraskrásetingum á, er mál fyri Aðalskrivstovu FSF's.

HB kann sambært grein 10, bókstav f í 1. reglubroti í Aga- og etisku reglugerðini, kæra úrskurðin til Yvirkærunevndina. Freistin at kæra er 5 dagar.

## Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli

07 Vestur kærir HB fyri brúk av í minsta lagi tveimum ólógligum leikarum til dystin 29. juni. Talan er um leikaran Trygvi Weihe, hvørs leikaraloyvi er í 07 Vestur og Heini Sørensen, hvørs leikaraloyvi er í FC Midtjylland.

07 Vestur klagar eisini um, at HB ikki lat dómaraseðilin inn, áðrenn dystarbyrjan.

HB hevur ikki gjørt viðmerkingar til kæruna.

## Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í aga- og etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

## Fakta í málinum

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar um nevndu leikarar, sum 07 Vestur hevur kært um.

FSF skrivstovan hevur staðfest, at hvørki leikaraloyvið hjá Trygva Weihe ella Heina Sørensen liggur í HB.

Staðfestast kann, at HB ikki hevur latið inn dómaraseðil frá dystinum. Staðfestast kann eisini, at HB ikki hevur gjørt viðmerkingar til málið.

# AGA- & ETISKANEVNDIN

**Lógarverkið**

Kappingarreglugerðin ásetur í grein 15, at leikarar skulu vera skrásettir ella hava loyvisbræv í tí felag, sum leikarin leikar fyri.

Sambært grein 28, stk. 5 í Kappingarreglugerðini, hevur felag ábyrgd av at fylla út leikaralistan áðrenn dyst. Sambært grein 28, stk. 4, 3. reglubrot, ger aðalskrivstovan úrskurð um, "hvørjar avleiðingar tað skal hava fyri viðkomandi felag, um dómaraseðilin ikki verður skrásettur rættstundis í skrásetingarskipan FSF's."

Sambært § 6 í aga- og etisku reglugerðini, kunnu persónar og feløg verða dømd agarevsing fyri brot á fótbóltsregluverkið.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at HB ikki hevur afturvíst kæruna um at hava brúkt í minsta lagi tveir navnnevndar leikarar í dystinum móti 07 Vestur 29. juni, sum ikki eru skrásettir hjá HB. Hetta er brot á grein 15 í Kappingarreglugerðini.

Aga- og etiskanevndin staðfestir eisini, at ikki ber til at eftirkanna, hvørjir leikarar leiktu fyri HB til nevnda dyst, tí at HB ikki hevur latið inn kravdan leikaralista sambært grein 28 í Kappingarreglugerðini.

Avleiðingin av at brúka ólógligar leikarar er, at HB verður dømt at tapa dystin móti 07 Vestur, 3. deild menn, leiktur 29. juni við málmuninum 0-3, sí grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í aga- og etisku reglugerðini og grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Sambært grein 4, stk. 3 í Aga- og etisku reglugerðini, er spurningurin um tað skal fáa avleiðingar fyri HB, at felagið ikki lat inn leikaralista til nevnd dyst, fevnt av løgdøminum hjá aðalskrivstovu FSF's og tí ger Aga- og etiska nevndin onki við tann partin av klaguni.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10, litra f í aga- og etisku reglugerðini, kann úrskurðurin um, at HB tapir dystin, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 10. juli* 2024**

Anni á Hædd

Anni á Hædd
forkvinna

*Av misgávum bleiv úrskurðurin ikki avgreiddur mótvegis FSF fyrr enn 26.8.2024

Í Aga- og etiskunevndini eru: Anni á Hædd, forkvinna og løgfrøðingur, Eli Thorsteinsson, næstformaður og løgfrøðingur, Ken Nónklett, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Sissal Kj. Kristiansen, sniðgevi og ráðgevi.